# Føroyskur matur til ungarskar gourmet gómar

**Vanliga ger Uni Gullfoss mat til føroyskar og útlendskar gómar á Hotel Hafnia, men hóskvøldið verða tað víðagitnir og vælbjargaðir ungarar í Budapest, sum fáa føroyska rullipylsu og skerpikjøt frá fyrrverandi sjónvarpskokkinum**




*Turóczi Gábor og Uni Gullfoss í Vágsbotni*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikumorgunin fór Uni Gullfoss til Budapest at gera eitt føroyskt sjálvtøkuborð til kokkar, politikarar, sjónleikarar, miðlafólk, og aðrar kendar og vælbjargaðar ungarar, sum gleðast um mat og savnast í Gourmet felagskapinum Lucullus Baráti Társaság. Tilsamans verða umleið 100 gestir til døgurðan, sum verður hildin á einum hotelli í ungarska høvuðsstaðnum. Borgarstjórin í Budapest og danski Ambassadørurin í Ungarn halda røðu áðrenn borðhaldið.

Umframt at matgera skal Uni eisini halda tveir smáar fyrilestrar; ein um føroyskan matskikk og matsøgu og ein um tann matin, sum verður á sjálvtøkuborðinum.

## Eingin grind

Uni hevur allan matin við úr Føroyum. Her er ferskt, turt og ræst lambskjøt, skinsakjøt og føroysk rullupylsa, hummarar, øður, rækjur, jákupskeljar, lippir og turrur og feskur fiskur. Ætlanin var at hava grind og spik við. Men boðini úr Ungarn vóru greið, verður tú tikin við hvalakjøti, so verður hald lagt á allan matin, tí vóru grindin og spikið løgd eftir.

Ynskini úr Ungarn hava verið greið, maturin skal vera siðbundin føroyskur matur, og hetta verður eisini høvuðsparturin av sjálvtøkuborðinum. Men Uni hevur eisini nakrar rættir, sum eru eitt sindur meira eksperimenterandi.

## Strævið pappírsarbeiði

Føroyar hava ikki góðkenning til útflutning av kjøti til ES, og hetta hevur verið ein stórur trupulleiki hjá Una, pappírsarbeiðið hevur verið strævið og tíðarkrevjandið, og myndugleikarnir í Ungarn eru sera stirvnir. Sjálvt við góðari hjálp frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hevur tað ikki eydnast at fingið neyðugu loyvini

Lucullus Baráti Társaság hava biðið Una um bara at koma, tí í Ungarn er pappírsarbeiðið ikki so týdningarmikið. Hevur tú nakrar dollarar við, slepst altíð ígjøgnum tollin. So tað var við krossaðum fingrum og mati og dollarum í taskuni, at Uni fór av landinum.

## Góðan stuðul

Uni sigur at ferðin til Ungarn slettis ikki hevði borið til, var tað ikki fyri tann góða stuðulin, sum Poul Michelsen, Poul Hansen, Kjøllbro og Hotel Hafnia hava veitt. Eisini er hann sera glaður fyri alt arbeiðið sum Turóczi Gábor miðlaráðgevi hjá ungarska felagskapinum hevur gjørt.

## Ungari í Miðlahúsinum

Turóczi Gábor var í Føroyum herfyri, hann var inni á gólvinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni og greiddi frá um felagskapin, um tankan aftan fyri Lucullus Baráti Társaság og um hví føroyskur matur er komin á skránna hjá teimum.

## Green Gate skapti sambandið

Á síni ferð í Føroyum vitjaði Turóczi Gábor Una. Sambandi við Una kom í lag gjøgnum eina ungarska ferðaskrivstovu, sum hevði samstarv við Green Gate. Green Gate sendi fyrispurning frá Lucullus Baráti Társaság til fleiri føroyskar kokkar, men Uni var tann einasti, sum svaraði.

## Bergtikin av náttúruni

Uni vísti honum nógvan føroyskan mat, sum t.d. grind, spik, skerpikjøt og annað seyðakjøt. Teir fóru eisini útferðir kring Føroyar og Turóczi Gábor var bergtikin av føroysku náttúruni. Hann fekk eisini høvið at vitja føroyingar privat, og uppliva hvussu vit liva. Honum dámdi sera væl og bílegði vegna Lucullus Baráti Társaság føroyska kokkin at koma til Budapest at matgera fyri limum felagskapsins.

## Skapa mentanarupplivingar

Felagskapurin Lucullus Baráti Társaság arbeiðir fyri at skapa mentanarupplivingar í Budapest, sum taka støðið í mati og matgerð. Limirnir í felagskapinum hittast einaferð um mánaðan til eina máltíð, har mentan og matur úr einum landi er á skránni, smakkurin av landins mati gerst vegurin inn í mentanina. Serfrøðingar siga frá um matin, og kvøldið verður kryddað við øðrum mentanarligum upplivingum.

## Føroyar eitt áhugavert land

Turóczi Gábor hevur sjálvur tikið stig til, at Føroyar skuldu á skránna hjá Lucullus Baráti Társaság. Hetta kemst av einum sterkum persónligum áhuga í Norðanlondum. Áhugin kom í lestrartíðini hjá honum, hann gjørdi serritgerð í íslendskum fjølmiðlum og kom í hesum sambandi fram á Føroyar. Tá hann so nú starvast hjá Lucullus Baráti Társaság, helt hann, at Føroyar kundu verið eitt áhugavert land at smakkað og upplivað hjá limunum í fel-agskapinum. Føroyar eru fullkomiliga ókendar í Budapest, og hetta ger kvøldið enn meira forkunnugt.

## Áhugaður í grindadrápi

Turóczi Gábor segði seg vera sera áhugaðan í grindadrápi. Hann heldur, at ídnaðarslakt og frystur matur hevur oyðilagt stóran part av mentanararvinum í nógvum londum. Sjálv prosessin har ein livandi vera gerst til mat, og maturin gerst partur aftur av eini livandi veru, og gerst til mann, er ein stórur partur av mentanini í Ungarn, í Føroyum og kring allan heim. Tað er týdningarmikið, at hetta ikki dettur burtur.

Hetta, at síggja mat, sum annað enn ein háttur at gerast mettan, er eitt av høvuðsendamálunum hjá Lucullus Baráti Társaság. Felagskapurin er eitt mótrák móti skundverðum, tey arbeiða við hugtakinum Slow Food, og njótanin av smakkum er raðfest fremst.

## Kunnleiki veksur um áhugan

Seinastu vikurnar hevur Turóczi Gábor gjørt viðtalur um Føroyar 30 ferð til bløð og aðrar miðlar í Ungarn. Tað eru nógv kend, vælbjargaði og miðlafólk, sum eru limir í felagskapinum, og hetta kvøldið er eitt frálíkt høvi at kunna um Føroyar, aftan á máltíðina skal Uni gera eina samrøðu við ungarskt sjónvarp, og við tríggjar ymiskar útvarpsstøðir, hetta kann so skapa ein áhuga fyri Føroyum millum ungarar. Í síðsta enda kann hetta gerast vinningur hjá føroysku ferðavinnuni.

## 200 Gestir og ein Makrelur í Vega

Aftur í ár verður Atlantic Music Event í Vega, í fjør spældu Eivør, Gestir og Makrel fyri einum útseldum Vega, og í ár verða tveir av bólkunum aftur, men Eivør er skift út við, Føroya best umtókta punk bólk: 200. Tiltakið verður 27. august.

Vega gjørdi, longu tá Atlantic Music Event varð hildið har í fjør, avtalu við Norðurlandahúsið, um at tiltaki_ skuldi endurtakast. Tí var konsertin millum vinningarnar á Atlantic Music Event í Norðurlandahúsinum í apríl. Umboð fyri Vega vóru til AME og valdu 200, Makrel og Gestir til donsku útgávuna av Føroya størstu tónleikashowcase.

**nud**

## Politistafelagið kærir

**Føroya Politistafelag hevur tikið stig at kæra avgerðina hjá fútanum um at flyta tveir politistar úr Vágum og sýslumannin í Vestmanna til Havnar. -Vit fingu eina viku at gera endaligar viðmerkingar til uppleggið, men endaliga avgerðin var í veruleikanum longu tikin tá frá leiðslunnar síðu, sigur formaðurin í Føroya Politistafelag, Eyðun Berg**

KÆRA

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Avgerðin hjá politileiðsluni um at flyta sýslumannin í Vestmanna og tveir politistar úr Vágum til Havnar hevur fingið Føroya Politistafelag at tala at. Tað stendur at lesa í Dimmalætting týsdagin.

Eyðun Berg er formaður í Føroya Politistafelag, og hann fílist á, at Føroya Politistafelag ikki í nóg stóran mun er tikið upp á ráð, tá ovasta leiðsla á føroyska politinum, ið er mannað av Mogens Nepper-Christensen, fúta, Una Vestureið, politiinspektøri og Halldis Poulsen, skrivstovuleiðara á Fútaskrivstovuni, gjørdi av, at flyta tveir politistar úr Vágum og sýslumannin úr Vestmanna til Havnar.

- Vit fingu eina viku at gera endaligar viðmerkingar til uppleggið, men endaliga avgerðin var í veruleikanum longu tikin tá frá leiðslunnar síðu, sigur Eyðun Berg.

Felagið hevur tí tikið stig at kæra avgerðina hjá málsviðgerðina hjá politileiðsluna fyri hægri myndugleika í Danmark.

## Eingin effektivisering

Formaðurin í Føroya Politistafelag sigur seg ivast stórliga í grundgevingunum hjá fútanum.

- Eg loyvi mær stórliga at ivast í, um politiarbeiðið verður effektiviserað við bygnaðarbroytingunum, heldur tvørturímóti. Hóast samferðslukervið millum høvuðsstaðin og Vágar er batnað við undirsjóvartunlinum, so ivist eg í, um politiarbeiði í Vágum verður stýrt betur úr Havn, sigur Eyðun Berg.